Kunngerðablaðið A

2024

Givið út 14. juli 2024

Nr. 78

14. juli 2024

**Kunngerð
um
veiðigjald á makreli, sild og svartkjafti 1. august 2024 til 31. juli 2025**

Við heimild í § 5, stk. 2 í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023, verður ásett:

*Skylda at rinda veiðigjald*

**§ 1.** Eigari av fiskifari, undir føroyskum flaggi, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal í tíðarskeiðinum 1. august 2024 til 31. juli 2025 rinda veiðigjald av veiðu av makreli, sild og svartkjafti.

*Stk. 2.* Veiðigjaldið er:

1) 1,45 kr. fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli.
2) 1,18 kr. fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av sild.
3) 0,40 kr. fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av svartkjafti.

*Stk. 3.* Veiðigjaldið fer í landskassan.

*Gildiskoma*

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2024.

Fíggjarmálaráðið, 14. juli 2024

**Ruth Vang (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason (sign.)